# E - og tónleikurin



**Magni Christiansen, tónleikari**

*Kemur tú úr einum heimi við ljóðføri?*
– Ja, tað hevur altíð verið sungið nógv heima hjá okkum.

*Spælir tú nakað ljóðføri?*
– Guitar, bass, eitt sindur á trummur.

*Syngur tú undir brúsuni?*
– Ja, tað geri eg.

*Hevur tú nakrantíð droymt um at gerast tónleikari?*
– Ja, tað hevur altíð verið ein dreymur.

*Hvat hevur tónleikur at siga fyri teg?*
– Hann er ein stórur partur av mínum lívi.

*Hvussu nógvar fløgur/plátur/bond eigur tú?*
– 850 fløgur, har á leið.

*Hvat er tín yndisfløga?*
– Tað er ein fløga við Randy Travis, sum eitur Rise and Shine.

*Hvørja fløgu hevði tú ikki viljað átt, um tú so fekst pengar afturfyri?*
– Tað veit eg ikki.

*Hvør sangur skuldi ongantíð verið skrivaður?*
– Tað veit heldur eg ikki.

*Hvat er tann pínligasta plátan, sum tú eigur?*
– Allar pláturnar, sum eg eigi, dámar mær meir ella minni.

*Hvønn sang hevði tú valt, um tú skuldi sungið karaoke?*
– No the other hand við Randy Travis.

*Hvat er tann besti tónleikurin til eitt hugnaligt kvøld?*
– Country tónleikur og andaligur tónleikur.

*Hvønn tónleik vilt tú helst hoyra sunnumorgun?*
– Framvegis country ella andaligan tónleik.

*Hvør tónleikur fær teg í ringt lag?*
– Kanska um eg hoyri ov nógvan jazz, annars ongin.

*Hvør sangur kann fáa teg út á dansigólvið?*
– Tað eru so nógvir.

*Hvat er tann fyrsti sangurin, sum tú minnist teg dáma?*
– One Night við Shakin Stevens.

*Hvønn sang ert tú fegnast um at hava verið við til at gjørt ella spælt inn?*
– Her glaður eg ferðist og Sig mær ta gomlu søgu.

*Hvør sangur skal spælast til tína jarðarferð?*
– Himmalin hvør vøkur sjón.

*Hvat er tann besta konsertin, sum tú hevur verið til?*
– Ein konsert við Tamra Rosanes.

*Hvønn tónleikara hevði tú viljað hitt?*
– Uha, tað eru nógvir, Alan Jackson.

whazzzup!!!

Forrige · Næste · Svar · Svar alle · Videresend · Flag · Udskriv · Rediger · Slet · Ombryd igen · Udkast

**TELDUBRÆVIÐ**

Frá: Rúnar Reistrup, Keypmannahavn, runar@reistrup.com
Til: post@sosialurin.fo
Evni: Vikuskifti

## Jóanes Nielsen styggir fólk til Ballerup

Í dag, 26. februar 2004, er eitt slag av jólaaftan fyri allar bókaormar í Danmark, tí í dag byrjaði stóra árliga bókaútsølan. Í morgun høvdu bókahandlarnir funnið innkeypskurvarnar fram úr kjallaranum og sett tær fram í handlinum, soleiðis at vitanar- og undirhaldshungrandi viðskiftafólk høvdu ein livandi kjans at bera allar tær innbundnu síðurnar, sum frá í dag kunnu ognast fyri ein minni penga enn vanligt.

Hjá Arnold Busck í Købmagergade var fullkomið bókahandilsanarki longu veruleiki, tá eg kom inn einaferð út á seinnapartin. Nakrar av teimum fleiri enn áttahundrað bókunum í tilboðsblaðnum vóru longu útseldar, neyvt skipaðu bókarúgvurnar vóru væl á veg í kaotiskt bland, og fólkatættleikin framman fyri rúgvunum var sum á Áarvegnum á ólavsøku.

Tað eru ikki føroyskir rithøvundar, sum fylla mest á bókaútsøluni hesaferð. Í mínari leiting ígjøgnum tær 857 útsølubøkurnar, ið hesin handilin hevði í útboði, fann eg bara tvær. Tann fyrra eg rendi meg í var eingin minni enn samlaðu yrkingar William Heinesens, ið varð útgivin í 1984. Tann seinna var ein lítil bók við heitinum "Gummistøvlerne er de eneste tempelsøjler vi ejer på Færøerne". Orðalagið í heitinum er so eyðkent, at tað næstan ikki er neyðugt at siga ókunnugum frá, at Jóanes Nielsen er høvundurin til hesa skaldsøguna.

Hvussu nógv tað sigur um nakað sum helst, veit eg í grundini ikki. Men eg beit merki í, at júst hendan bókin var óvanliga nógv niðursett. Í gjár kostaði hon 168 krónur, í dag 29 krónur og 90 oyru. Tað fekk bókahandilin burturúr mínum lumma, og "Gummistøvlerne er de eneste tempelsøjler vi ejer på Færøerne" liggur nú á mínum náttborði - saman við eini fimtan øðrum verkum, sum funnu sær veg niður í innkeypskurvina í dag.

Hvussu nógvar aðrar innkeypskurvar bókin sníkti seg niðurí er ilt at gita um, men um fólk taka ummælarar fyri fult, vænti eg, at bókin er farin í kurvina hjá fleiri Berlingskelesarum enn Politiken-lesarum.

Eitt sindur øvugt er tað, tá hugsað verður um hvat av dagbløðunum báðum høvundurin man geva besta ummæli, at Jørgen Johansen, ummælari á konservativa Berlingske Tidende, taldi "Brúgvar av svongum orðum" hjá Jóanes Nielsen millum favorittarnar at fáa Bókamentavirðisløn Norðurlandaráðsins, meðan Niels Lyngsø, ummælari á meira reyðdæmda Politiken alment postulerar, at hann flytur til Ballerup í protest, um Jóanes Nielsen vinnur virðisłønina.

Virðislønin varð handað eftir at hesin teldupostur var sendur ígjøgnum nýlagda Far-Ice kaðalin, ið bindur Føroyar til meginlandið reint tøkniliga, og tí veit eg ikki, um nakar ummælari í hesi løtu gongur runt í Ballerup og hyggur sær eftir húsum.

Men kanska áttu føroyingar at tikið meira ítøkilig stig til at víst hesum ummælara og øðrum dønum eitt sindur meira av føroyskum skaldskapi, t.d. við at skapt betri treytir fyri tey, sum hava hug og hegni at umseta føroyskar bókmentir til onnur mál. Harvið kundi man bundið Føroyar eitt sindur betur til meginlandið reint mentunarliga.

Og so kundu føroysku bøkurnar á komandi donskum bókaútsølum kanska eisini blivið eitt sindur fleiri í tali.




# Aðalfundur

## í Eftirlønargrunni Føroya Arbeiðarafelags

Aðalfundur felagsins verður

**leygardagin 20. mars kl. 14.00**

í hølum Føroya Arbeiðarafelags, Tjarnardeild 7, 100 Tórshavn.

**Dagsskráin:**
1) Val av fundarstjóra
2) Frágreiðing frá nevndini um farna ár
3) Framløga av ársroknskapi við grannskoðaraátekning til góðkenningar
4) Val av nevnd
5) Val av grannskoðara
6) Innkomin uppskot
7) Ymiskt

**Eftirlønargrunnur Føroya Arbeiðarafelags**

# Aðalfundur

## í Føroya Arbeiðarafelag

Fráboðaði aðalfundur Føroya Arbeiðarafelags verður

**fríggjadagin og leygardagin 19.-20. mars**

í hølum felagsins, Tjarnardeild 7, 100 Tórshavn, **byrjað verður báðar dagar kl. 10.00.**

Uppskot til fundin skulu vera skrivstovu felagsins skrivliga í hendi **í seinasta lagi mánadagin 1. mars 2004.**

Seinasta freist fyri tilmelding til aðalfund og innivist er 1. mars 2004.

**Føroya Arbeiðarafelag**

HJÁ GUNLEIVI

# Bakaralærlingur

Søkt verður eftir bakaralærlingi.

Lærutíðin er 4 ár, harav 35 vikur á tekniskum skúla.

Arbeiðstíðin er mest um dagin, hóast nakrar náttarvaktir eru.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at ringja til okkara og spyrja eftir Eli Andreasen.

**Bakaríið hjá Gunleivi**
Tlf. 59 88 38 ella 31 21 61

Vit selja
DAEWOO
Skips motorar

**FRÁ 20 HK TIL 1000 HK**



**GENERATORAR · STÝRIMASKINUR**

**TILBOÐ:**
**320 HK BÁTAMOTORUR**
**Prísur u/mvg 100.000 kr.**

Umboð:
**Thorleif Samuelsen**
Undir Gráasteini 68 · 100 Tórshavn
Tel 317713 · Fartel 283138

# Línubátur til sølu HEYKUR TG 14



Báturin er 19 brt og hevur fiskiloyvið 4A.
70 dagar á landleiðini og 30 dagar á Føroya Banka.
Boð undir 1.080.000 kr. ongan áhuga.

**www.batur.fo**
**telefon 33 39 40**
**Gsm 22 87 41**

**Arbeiðshandskar**
**til øll endamál - bæði á sjógvi og landi**
Beinleiðis frá framleiðara
**Landsins størsta úrval**
frá eingangshandskum til fóðraðar Japan-handskar
**ADC-Heilsølan** spf
Láarvegur 14 • 100 Tórshavn • Tel. 315828 • Fax 315893
adc@adc fo
Sosialurin 311820

# Frá Bóndafelagnum

**Aðalfundur** felagsins verður í Búnaðardeplinum leygardagin 13. mars 2004 kl. 11.
**Skrá:** Sambært lóg felagsins.

**Formaðurin**

# Starvsfólk
## til Ferðslutrygd

Søkt verður eftir fólki til hálvtíðarstarv – við møguleika fyri øktari arbeiðstíð.

Hevur tú hugflog og dugir tú at seta ætlanir í verk, er hetta júst rætta starvið til tín.

Tú skal megna at taka tær av uppgávum frá byrjan til enda; heilt frá hugskoti til ætlanin er framd. Tú skal duga væl at leggja til rættis, hava ans fyri smálutum og tora at siga tína hugsan. Tað er eisini alneyðugt, at tú hevur góðan málsligan førleika, bæði í skrift og talu. Eins sjálvsagt er, at tú hevur góðan førleika at nýta teldu.

Royndartíðin er tríggjar mánaðir, og starvið fyribils galdandi eitt ár. Starvstíðin byrjar sambært avtalu.

Nærri frágreiðing um starvið fæst við at venda sær til *Jón Kragesteen, leiðara, á tlf. 310204*.

Umsókn saman við viðmælum, upplýsing um útbúgving og starvsroyndir, skulu vera okkum í hendi *í seinasta lagi 1. mars 2004*.

**Ráðið fyri Ferðslutrygd**
Yviri við Strond 21 · 100 Tórshavn
Tlf. 310204 · Faks 310979
www.rff.fo · rff@rff.fo

# Skrivstovufólk til skuldarabókhald

Til eitt virki í Tórshavn verður søkt eftir einum fólki til skuldarabókhaldið. Arbeiðið snýr seg fyrst og fremst um at røkja sambandið við skuldararnar, at gera gjaldsavtalur við teir og hava eftirlit við, at tær verða hildnar.

Talan er ikki um fulltíðarstarv, og tann, sum settur verður í starvið, kann sjálvur vera við til at leggja arbeiðstíðina til rættis.

Løn sambært avtalu.

Starvið skal setast so skjótt sum til ber. Nærri upplýsingar kunnu fáast við at venda sær til Grannskoðarafelagið Rasmussen & Weihe.

Umsóknir skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 1. mars 2004.

Sosialurin 341800

**RASMUSSEN & WEIHE**
STATSAUTORISERAÐ GRANNSKOÐARAFELAG P/F
PRICEWATERHOUSECOOPERS
An associated firm of
Á Glaðsheyggi · Box 30 · FO-110 Tórshavn
Tel. (+298) 35 17 00 · Fax (+298) 35 17 01
E-mail: rasmussen@rasmussen.fo
http://www.rasmussen.fo